Føstulávintsdansur í høllini á Hálsi

Stuðulsfelagið Knørrur skipar í kvøld fyri dansi við Juliannu Boys

DANSUR
Tíðindaskriv

Í kvøld, leygarkvøldið kl 23, verður dansur í ítróttarhøllini á Hálsi har Juliannu Boys spæla undir. Juliannu Boys eru kendir um landið sum dansibólkur. Teir spæla góðan dansitónleik fyri allar aldursbólkar.

Teir eru nógv eftirspurdir og hava tí langan bíðilista.

Høllin verður prýdd við ljósperum í øllum litum, borð og stólar verða sett upp og okkurt verður til keyps fyri tosta.

Rammurnar um eitt gott og hugnaligt kvøld, skuldu sostatt verið av teimum bestu.

Tað er nýstovnaða stuðulsfelagið hjá Róðrarfelagnum Knørri, sum skipar fyri dansinum. Felagið skipaði eisini fyri jóladansinum, sum var í desember. Tað tiltakið eydnaðist stak væl.

Umleið klokkan 03.15 verður drigið um eina APEX ferð frá Atlantic Airways til Keypmannahavnar og aftur. Vinnarin verður sotatt funnin á staðnum. Tí ræður um at goyma atgongumerkið og at verða til staðar í høllini.

Drigið verður til ein vinnari er funnin.

Róðrarfelagið Knørrur, varð stovnað í 1985, tá nakrir ungir dreingir keyptu gamla áttamannafarið Postbátin.

Báturin varð nevndur »Knørrur«. Fimm ár seinni, í 1990, keypti felagið ein bát afturat. Tað var eitt nýtt seksmannafar, sum Hanus Jensen bygdi, og varð hann nevndur Jarnbardur.

Síðani eru báðir bátarnir útskiftir við nýggjar, sum Sámal Hansen hevur bygt. Fyrst Knørrur í 2001 og so Jarnbardur í ár. Gamli Knørrur eitur nú Ormurin Langi, og hann luttøk eisini í FM kappingini í summar.

Felagið hevur vunnið fleiri FM meistaraheiti við bæði Knørri, men serliga við Jarnbardi.

Øll árini, hevur felagið hildið til við Lágukai, í grótneystinum, í krókinum við Waldemar Lützen, á Skálatrød.

Ikki kann sigast at umstøðurnar eru góðar hjá felagnum. Neystið hevur bert til endamáls at fáa bátarnar undir tak, heitt vatn er onki og heldur ikki skiftirúm o.t.

Felagið hevur allatíðina, síðani tað varð stovnað, havt ein dreym, um at fáa eitt tíðarhóskandi neyst. Men fíggjarliga orkan hjá felagnum, hevur ikki rokkið stórt longur enn til vanliga raksturin. Men nú tá stuðulsfelagið er stovnað, og farið til verka, sær framtíðin kanska ljósari út.

Stuðulsfelagið vónar, at nógv leita sær í dans.

Atgongumerki á kr 100,- fáast við dyrnar, í forsølu á Kunningarstovuni og hjá Fish and Chips á Vaglinum.

Aldursmarkið er 20 ár.

Angela og Hannibal á Eiði

FØSTULÁVINT
Tíðindaskriv

Í dag, leygardagin, skipar Eiðis Bóltfelag fyri føstulávintshaldið fyri børnum og vaksnum. Tiltakið verður í fimleikarhøllina í Eiðis skúla, og byrjar tað kl 15.

Tá koma Angela og Hannibal, ið eru kend frá Sjónvarp Føroya at undirhalda fyri børnum og vaksnum. Eftir at tey bæði hava undirhildið verður tunnusláing fyri børn frá 7 klassa og niðureftir

Eisini verður køkutombola og kaffi og køkur verða at fáa til keyps.

Tey vaksnu sleppa eisini uppí part at sláa tunnu. Tað gongur fyri seg, eins og undanfarin ár, á vaglinum kl. 19.30.

– Møtið fjølment og grýluklødd, heilsa tey av Eiði.

Landsstýrismenn og aðalstjórar á skúlabonki

Nýggju landsstýrismenninir hava verið á skeiði í at læra, hvussu teir skulu bera seg at

EVNISDAGUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Næstin allir landsstýrismenninir hava ongar royndir í landsstýrisarbeiði og tí skipaði løgmaður fyri skeiði í at læra teir, hvussu teir eiga at bera seg at

At verða landsstýrismaður er ikki bara sum at siga tað. Tað eru nágreiniligar reglur fyri, hvussu ein landsstýrismaður skal bera seg at og tað eru nágreiniligar reglar fyri, hvat hann hevur loyvi til og ikki.

Men samstundis eru tað nógvar óskrivaðar reglar fyri, hvussu ein landsstýrismaður skal bera seg at, fyri at fáa tað politiska arbeiðið at gliða.

– Tí gjørdu vit av at skipa fyri enum evnisdegi herfyri, har í landsstýrismenn og teirra aðalstjórar fingu undirvísing í, hvussu politiska skipanin í Landssýrinum virkar-og eigur at virka, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Tað er ongin loyna, at undanfarna samgonga var ikki júst heimsmeistari í at samskipa tað politiska arbeiðið og at fáa tað at gliða. Avleiðingin av tí var, at tað var mestsum dagligur kostur, at politikarar úr samgonguni brustu saman í hørðum orðadrátti fyri opnum teppi í Løgtingi og í fjølmiðlum.

Uttan iva hevur ein høvuðsorsøk til tað verið, at tað knípti við samskiftinum í landsstýrinum og at tað politiska arbeiðið í samgonguni varð ikki nógv væl samskipað. Tí vóru nógv mál løgd fyri Løgtingið, áðrenn politisk semja varð fingin um tey og tað elvdi til nógv slagsmál í samgonguni fyri opnum teppi.

Forða fyri almennum ósemjum

Jóannes Eidesgaard, løgmaður heldur, at slíkar innanhýsis ósemjur, sum vit upplivdu undir farnu samgongu, eru ógvuliga uppslítandi og órógvandi og eru við til at máa støðið undan álitinum á samgonguna.

Og tað vil hann ger nógv fyri at spara hesa samgonguna fyri.

Men tað er onki at ivast í, at hann fær seg royndan, tí hetta landsstýrið er eisini í teirri serligu støðu, at heilir fimm av teimum sjey landsstýrismonnunum hava als ongar royndir úr landsstýrinum. Tað eru bara Jóannes Eidesgaard og Bjarni Djurholm, sum hava verið landsstýrismenn áður. Tí var endamálið við evnisdegnum at greiða landsstýrismonnunum frá, hvat er rætt og hvat er skeiv mannagongd. Og ikki minst var evnisdagurin um, hvat er góður siður og hvat er vánaligur siður í landsstýrisarbeiðnum.

– Endamálið var at kunna landsstýrismenninar um, hvat er góður fyrisitingarligur siður. Endamálið var eisini at kunna teir um tær mannagongdir, sum eru galdandi fyri arbeiðið í landsstýrinum og at greiða teimum frá lógini um ábyrgd landsstýrismanna, styrisskipanarlógini og fyrsitingarlógini, sum landsstýrismenn arbeiða undir, sigur Løgmaður.

Fáa arbeiðið at gliða

Men samstundis vóru landsstýrismenn eisini kunnaðir um, hvussu løgmaður vil hava, at arbeiðið í landsstýrinum verður skipað.

– Tað er umráðandi at vit alla tíðina kunna hvønn annan um tey ymisku viðurskiftini og at vit eru opnir fyri hvørjum øðrum.

– Og kanska er tað mest umráðandi av øllum, at tá ið trupuleikar taka seg upp, so verða teir lagdir fyri samgonuna, áðrenn teir sleppa at veksa seg so stórar, at aðrir taka teir úr hondunum á okkum, sigur Jóannes Eidesgaard og sipar til andstøðuna.

Hann sigur, at tað er stórur munur á at vera løgtingsmaður, sum kann føra sín egna, partapolitikk og at vera landsstýrismaður, sum varar av einum heilum málsøki.

– Ein landsstýrismaður hevur ein heilt annan leiklut enn ein tingmaður, tí ein landsstýrismaður er ein umsitari av einum málsøki. Sostatt skal landsstýrismaðurin virða nakrar mannagongdir og hann kann ikki taka partapolitisk atlit í sama mun sum ein tingmaður.

– Ein landsstýrismaður hevur eisini ein serligan leiklut í Løgtinginum, tí landsstýrismenn eiga, so vítt gjørligt, bara at viðgera tey málsøki, teir sjálvir umsita og teir eiga helst ikki at leggja seg út onnur málsøki.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað varð eisini greitt frá, hvussu teir politisku landsstýrisfundirnir fara fram, hvussu, og nær landsstýrismenn leggja mál fyri landsstýrið og yvbirhøvur, hvussu samskiftið í landsstýrinum eigur at vera.

Jóannes Eidesgaard sigur, at síðani vit fóru yvir til hesa nýggju skipanina liggur ein heilt onnur ábyrgd á hvørjum einstøkum landsstýrismanni enn tað gjørdi undir teirri gomlu skipanini, har landsstýrið var ferlags um allar avgerðir. Nú er tað hvør landsstýrismaður sær, sum tekur avgerðir á sínum øki.

Stór krøv til Løgmann

Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta setir stór krøv til løgmann, sum hevur ábyrgdina av at samskipa arbeiðið í landsstýrinum, so at talan í veruleikanum verður um eitt landsstýrið og ikki sum sjey.

Hann sigur, at nú hevur hann eisini arbeitt undir eini aðrari skipan, tey árini, hann, hann sat í fólkatinginum.

– Har eru mannagongdirnar nógv tryggari og væl skipaðar enn vit eru von við. Har var ógvuliga stórur dentur lagdur, at málini vóru greið, tá ið tey vóru løgd fyri fólkatingið og at samskiftið ímillum ráðharran og tað politiska baklandið, fólkatingið, var gott og og at hvør flokkur hevði sína støðu greiða, tá ið eitt mál varð lagt fyri fólkatingið - og at hvør flokkur hevði framsøgufólk, sum talaði floksins vegna.

– Tað krevur eisini meiri av teimum politisku flokkunum og ein stór uppgáva hjá løgmanni verður at trygga samskiftið ímillum landsstýrið og flokkarnar í samgonguni.

Tað krevur so aftur, at flokkarnir í samgonguni menna seg og gera mannagongdir fyri, hvussu teir viðgera mál innanhýsir og at teir so viðgerða tey mál, teir fáa til ummælis frá landsstýrinum og boða landsstýrinum frá frá teimum viðmerkingum, teir hava, so at uppskotið er liðugt, tá ið tað verður lagt fyri tingið, fyri at sleppa undan innanhýsis stríði í samgonguni, tá ið landsstýrið leggur mál fyri Løgtingið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eisini aðalstjórar vóru á skúlabonki hendan dagin. Løgmaður sigur, at tað kom nógv burturúr. Her situr Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum vinstrumegin, og Rúni Joensen, aðalstjóri í Løgmálaráðnum